# uds kærleika



**FAKTA**

### Gerandisdagur á Zarepta

Henda summarlegan koyrir eftir rættiliga fastari skrá. So vita øll, nær tey skulu til tey einstøku tiltøkini. Dagsskráin er henda:

| | |
|---|---|
| 8:00 | Veking |
| 8:25 | Merkið á stong |
| 8.30 | Morgunmatur |
| 9:00 | Andakt |
| 9:30 | Rudding |
| 10:00 | Bíbliutími |
| 10:45 | Fríløta |
| 11:15 | Bíbliutími |
| 12:00 | Døgverði |
| 13:00 | Frí, ítróttur, kiosk o.a. |
| 15:00 | Drekka (sjálvtøka) |
| 16:30 | Tøkur tími |
| 17:30 | Náttverði |
| 18:30 | Hugnaløta |
| 21:00 | Kvøldseta |
| 22:00 | Drekka |
| 23:00 | Andakt |



*Er ein bóltur á staðnum, so kunnu dreingirnir hugna sær leingi. Og tað gera teir*



*- Eg eri einsamallur úr Funningi, men tað ger einki, tí eg kendi so nógvar dreingir aftur frá øðrum legum, sigur 15 ára gamli Jógvan Bjarni Juul*

# – Mær dámar væl at syngja

Á summarleguni í ár møtti Jógvan Bjarni Juul úr Funningi aftur nógvum av vinmonnum sínum.

SUMMARLEGA
*Snorri Brend*

Vatnsoyrar: - Eg siti beint nú og bíði eftir at tað skal verða okkara tørn at fara á vøllin at spæla dyst.

Ein annar luttakari á summarleguni á Zarepta er 15 ára gamli Jógvan Bjarni Juul úr Funningi.

Hann hevur eisini verið her fleiri ferðir áður, og hann er eins fegin um legurnar hvørja ferð.

- Her er gott at vera, tí ein møtir nýggjum vinum. Og ein sær fleiri aðrar aftur, sum eg havi verið á legu saman við fyrr, sigur hann.

**Hoyra um Jesus**

Hóast Jógvan Bjarni er einastur úr Funningi á hesi stóru leguni, so leggur hann einki í tað.

Á leguni vóru eisini fleiri aðrir dreingir sum hann hevði sæð fyrr. Teir sótu nakrir og hugdu eftir einum dysti á vøllinum og bíðaðu, tí at teir í dag áttu at spæla tann seinasta dystin.

- Her er gott at vera. Her er stuttligt og so hoyra vit eisini nógv um Jesus. Og í gjárkvøldið blivu fleiri frelst, sigur hann fegin frá.

Honum dámar eisini væl at syngja, og tað fær hann somuleiðis ríkt høvi til á hesi leguni.